# Ársfrágreiðing 2007

## Frágreiðing um virksemi stovnsins og gongdina á fjarskiftismarknaðinum

Tórshavn, 14. mars 2008

Post- & Fjarskiftiseftirlitið, Skálatrøð 20, Postboks 73, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
Tel: +298 35 60 20, Fax: +298 35 60 35, T-postadr.: fse@fse.fo, Web: www.fse.fo

1. Fororð ....................................................................................................................................... 3

2. Fjarskiftiseftirlitið ................................................................................................................. 5

2.1. Stovnurin Fjarskiftiseftirlitið ........................................................................................ 5
2.2. Fíggjarviðurskifti ......................................................................................................... 6

3. Veitan av koncessión .......................................................................................................... 6

3.1. Koncessiónir (fjarskiftisloyvi) veittar sambært fjarskiftislógini § 8 ............................. 6

4. Fjarskiftisveitingar og marknaðarstøðan ............................................................................ 8

4.1. Breiðband og internet ................................................................................................... 8
4.1.2. Verkætlan um evnið *"Quality of services, standards and interlayer mapping"* ........... 9
4.2. Fastnet- og IP-telefoni ................................................................................................. 10
4.3. Fartelefoni .................................................................................................................. 11
4.4. Fylgisveinatænastur .................................................................................................... 11
4.5. Sjóøkið ........................................................................................................................ 11
4.6. Kringvarpsvirksemi v.m. ............................................................................................ 11
4.7. ÚF/SVF sendinetini (Kringvarp Føroya) .................................................................... 12
4.8. Uttanlandssamskiftistøknir .......................................................................................... 13

5. Treytir og meginreglur ....................................................................................................... 13

5.1. Sambinding og samskipan av fjarskiftiskervum og fjarskiftistænastum ..................... 13
5.2. Prísásetingarmeginreglur ............................................................................................ 14
5.2.1. Prískanning ............................................................................................................... 15
5.3. Veitingarskyldan hjá Føroya Tele ............................................................................... 15
5.4. Tilbúgvingarviðurskifti ............................................................................................... 16

6. Nummarviðurskifti ............................................................................................................ 17

7. Einskiljingartilgongdin av Føroya Tele ............................................................................ 17

8. Radioeftirlitsvirksemi – tilluting av frekvensum (tíddum), radioprógvum o.a. ................ 19

9. Altjóða og millumtjóða viðurskifti ................................................................................... 20

## 1. Fororð

Fjarskifti er ein sera týdningarmikil vinnugrein. Henda vinnugrein bjóðar samskiftis-hættir, ið verða nýttir av næstan øllum borgarum og fyritøkum.

Tøkniliga menningin innan KT og fjarskifti, saman við frælsgering, eru mest umráðandi orsøkir til vegin og ferðina á menningini á fjarskiftisøkinum. Kapping saman við tøkniligu menningini eru mest umráðandi drívkraftir innan fjarskifti.

Í Føroyum hevur vøksturin av breiðbandshaldum, eins og undanfarin ár, hildið fram í 2007. Flest øll húsarhald í Føroyum hava møguleika at keypa breiðsbandstænastur. Tað eru heilt fá búpláss eftir, ið ikki hava møguleika at samskifta umvegis breið-bandið.

Útbreiðslan av breiðbandi í mun til fólkatalið tykist eisini at vera høg og er støðugt vaksandi. Við árslok 2007 var talið á breiðbandshaldum komið upp á 13.200 hald. Hetta er ein vøkstur upp á góð 31 % í mun til árslok 2006 og ein vøkstur upp á góð 125 % í mun til árslok 2005. Samstundis sum útbreiðslan av breibandshaldum veksur, minka haldini av uppringdum interneti.

IP-telefoni tænasta, veitt frá føroyskum veitara, kom á føroyska marknaðin í desember 2005. IP-telefoni er telefonsamskifti umvegis internetið. Tað hevur gingið eitt sindur striltið at fáa IP-telefoni at taka dik á seg, kanska serliga orsakað av at størru veitararnir innan breiðband enn ikki bjóða út IP-telefoni tænastu. Men í 2007, serliga í seinnu hálvu, sæst ein týðilig framgongd í nýtsluni av ringdum minuttum. Talið av minuttum innan IP-telefoni er tó enn sera lágt í mun til samlaða talið av minuttum fyri aðrar telefoni-tænastur, t.d. fartelefoni og fastnet. IP-telefonsamskiftið við útlandið er munandi bíligari samanborið við vanligt fastnet telefoni ella fartelefon.

Nýtslan av fartelefon økist framvegis, og fartelefonin hevur fingið umráðandi leiklut í samfelagnum innan ymisk økir, eitt nú til kunning av ymiskum slag.

Upplýsingar sum farfjarskiftisveitarar hava latið Fjarskiftiseftirlitnum hava givið eina ábending um, at kappingin á farfjarskiftismarknaðinum ikki er nóg virkin og at prísirnir eru ov høgir í mun til marknaðarstøðuna. Tí hevur Fjarskiftiseftirlitið sett í verk eina kanning av fartelefonprísum.

Skjótt trý ár eru liðin síðan nýggi bygnaðurin á Føroya Tele (P/F Telefonverkinum) varð settur í verk, og meginparturin av tænastuvirkseminum varð lagt í P/F FT Sam-skifti og kervisvirksemið í P/F FT Net. Aftaná bygnaðarbýtið á Føroya Tele hevur kjakið kring felagið síðstu árini serliga snúð seg um einskiljingartilgongdina.

Undanfarna samgonga arbeiddi miðvíst við spurninginum um einskiljing av Føroya Tele, tó uttan at sjálv einskiljingin varð gjøgnumførd og uttan at endalig støða varð tikin til, hvussu einskiljingin av felagnum skuldi fara fram. Nýggj samgonga varð skipað í febuar 2008 og spennandi verður at síggja, hvønn leist henda samgonga fer at

leggja fyri einskiljingartilgongdina av Føroya Tele. Enn hava ongar ítøkiligar ætlanir um einskiljingina av Føroya Tele verið frammi. Í samgonguskjalinum er viðvíkjandi einskiljing ásett: *„Einskiljingar verða framdar, um mett verður, at tær eru til gagns fyri samfelagið og vinnubygnaðin”.*

Í øllum førum ræður um at finna eina loysn, ið ikki læsir støðuna fasta framyvir, men loyvir tillagingum, soleiðis at føroyski fjarskiftismarknaðurin til eina og hvørja tíð hevur kappingarførar og dagførdar kervistænastur, sum allir veitarar hava javnbjóðis atgongd til og harvið hava møguleika fyri at veita endabrúkaranum eitt breitt og fjølbroytt útboð av fjarskiftistænastum til kappingarførar prísir.

*Jógvan Thomsen*
*stjóri*

## 2. Fjarskiftiseftirlitið

Fjarskiftiseftirlitið (í hesi frágreiðing eisini nevnt FSE) er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Fjarskiftiseftirlitið umsitur Ll. nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, við seinni broyting í Ll. nr. 176 frá 21. desember 2001 (fjarskiftislógin).

Endamálið við fjarskiftislógini er sbrt. § 1 í lógini at fremja:

a. at fjarskiftistørvurin í Føroyum verður nøktaður og eina skilagóða nýtslu av tilfeinginum,
b. at javngóð fjarskiftistænasta verður veitt um alt landið til somu treytir
c. tøkniliga góðsku og tryggleika,
d. ótálmaða atgongd til almenn fjarskiftiskervi og almenna fjarskiftistænastu
e. samskipan av fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu
f. at fjarskiftistænasta verður lagað eftir tørvi
g. at áhugamál brúkaranna verða havd í huga,
h. persónsvernd
i. at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum

### 2.1. Stovnurin Fjarskiftiseftirlitið

Fjarskiftiseftirlitið er skipað sum stovnur saman við:

1. Kappingareftirlitinum www.kapping.fo
2. Posteftirlitinum www.posteftirlit.gov.fo
3. Tryggingareftirlitinum, ið eisini fevnir um eftirlit við Føroya Realkredittstovni (Realinum) www.tryggingareftirlit.gov.fo
4. Skráseting Føroya www.skraseting.fo

Stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum er eisini stjóri fyri hesar fýra stovnarnar. Harumframt verða starvsfólk á hesum stovnunum í ávísan mun brúkt til tvørgangandi arbeiði innan ymisku økini.

Á Fjarskiftiseftirlitinum eru hesi starvsfólk:

| Starvsheitir | Útbúgving |
|---|---|
| 1. Stjóri | M.Sc. E.E, B.Com. |
| 2. Samskipari á radioøkinum | Verkfrøðingur |
| 3. Deildarleiðari | Løgfrøðingur (Búskaparfrøðingur) |
| 4. Eftirlitsmaður á radioøkinum | Vaktoffiserur og fjarritari |
| 5. Bókhaldari | Skrivstovuútbúgving |
| 6. Samskipari (Skrivari, journalførari o.a.) | Skrivstovuútbúgving |

Bókhaldari og samskipari eru felags fyri teir 5 stovnarnar.

**2.2. Fíggjarviðurskifti**

Fjarskiftiseftirlitið er á fíggjarlógini undir grein 6.38.3.17. Fjarskiftiseftirlitið (Rakstrarjáttan). Virksemið hjá Fjarskiftiseftirlitinum verður fíggjað við rakstrargjaldi og eftirlitsgjøldum.

Fjarskiftisveitarar rinda rakstrargjald (koncessiónsgjald) í mun til marknaðarpart av føroyska fjarskiftismarknaðinum, og umsitingin av Radioeftirlitsdeildini verður fíggjað við frekvens(tíddar)- og avgreiðslugjøldum.

**3. Veitan av koncessión**

Sambært fjarskiftislógini eru tveir hættir at veita atgongd til at veita fjarskiftistænastur í Føroyum.

1. Tann eini er veitan av koncessión til fjarskifti (fjarskiftisloyvi) sambært § 8 í fjarskiftislógini.
2. Hin er, at landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at ávís øki sleppa undan einkarrættinum. Frælsgering sbrt. § 7 í fjarskiftislógini.

Politikkurin higartil hevur verið ein sonevndur ”open-door first come – first served politikkur” (opnar dyr – fyrri var fyrri fær) gjøgnum at veita koncessión sambært § 8. Í roynd og veru hevði tað ikki verið so stórur munur, um landsstýrismaðurin valdi at nýta heimildina í § 7, har øki vórðu frælsgjørd og samstundis vórðu orðaðar reglur í kunngerð um prísáseting, samflutning o.a. Hesi viðurskifti eru í dag ásett í koncessiónini.

**3.1. Koncessiónir (fjarskiftisloyvi) veittar sambært fjarskiftislógini § 8**

Fjarskiftiseftirlitið tekur ímóti og viðgerð umsóknir um koncessión. Í sambandi við umsókn um koncessión eru 5 kravfestingar, alt eftir hvat slag av koncessión søkt verður um. Koncessiónirnar eru stigaðar, sum niðanfyristandandi:

- Koncessión á 1. stigi – kringvarpsvirksemi
- Koncessión á 2. stigi - ætlað eigarafeløgum o.tíl.
- Koncessión á 3. stigi - internet- og aðrar samskiftistænastur
- Koncessión á 4. stigi - vanliga 3. stig, íroknað telefonstøðir
- Koncessión á 5. stigi - vanliga 3. og 4. stig, umframt fartelefonikervi og –tænastur

Fjarskiftiseftirlitið viðger fyrst eina umsókn um koncessión, síðan verður tilmæli latið landsstýrismanninum í samskiftismálum, ið tekur endaliga støðu.

Higartil eru fylgjandi koncessiónir veittar av landsstýrismanninum, sambært § 8 í fjarskiftislógini.

Koncessión á 1. stigi
(kringvarpsvirksemi)

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Sp/f Steinamørk (útvarp og sjónvarp) | (fyrr Rás2) |
| 2. | Sjálvsognarstovnurin Lindin (útvarp) | www.lindin.fo |
| 3. | Suðurrás (útvarp) (óvirkin) | www.sudurras.fo |
| 4. | Sp/f Kervi (sjónvarp) (óvirkin) | www.kervi.com |
| 5. | Sp/f Camelot (sjónvarp) (óvirkin) | |
| 6. | P/F Miðlavarpið (óvirkin) | www.sosialurin.fo |
| 7. | Kringvarp Føroya | www.kringvarp.fo |

Koncessión á 2. stigi (eigarafeløg o.l.)
(Koncessión til at reka og veita avmarkaða fjarskiftistænastu og fjarskiftiskervi í avmarkaðum øki (kaðal- og loftborið transmissiónskervi, kringvarpskervi, (hybridnet), internettænastu.

1. Eigarafelagið Millum Gilja / Oman flat
2. Eigarafelagið Inni á Gøtu
3. Eigarafelagið Norðasta Horn
4. Tykissamfelag Svínoy – Fugloy
5. Eigarafelagið Lítla Gil/Eystan Løgmannabreyt
6. Eigarafelagið Undir Brúnni
7. Rás Gjógv

Koncessión á 3. stigi
(Koncessión til innanlands telefonitænastur - leigulinjur innanlands, tekst- og dátu-samskiftistænastur, fylgisveinatænastur og aðrar virðisskapandi tænastur, íroknað internettænastur) (Telefonstøðir ikki íroknaðar).

| | | |
|---|---|---|
| 1. | El&Tele (óvirkin) | www.eltele.fo |
| 2. | Farodane (óvirkin) | www.farodane.fo |
| 3. | Formula.fo (óvirkin) | www.formula.fo |
| 4. | Atlantic Online | www.atlanticonline.com |
| 5. | Televarpið | www.televarp.fo |
| 6. | Auxilior (óvirkin) | www.auxilior.com |
| 7. | KT-felagið | www.industry.fo |
| 8. | Farice Hf. | www.farice.fo |
| 9. | SHEFA-2 | www.shefa.fo |
| 10. | P/F Elektron | www.elektron.fo |
| 11. | Fa. Opus | www.opus.fo |
| 12. | Fa. Nótin | www.notin.fo |
| 13. | Sp/f Transform | |
| 14. | P/F Føroya Breiðband | www.eitt.fo |

Koncessión á 4. stigi
(vanliga 3. stig og íroknað telefonstøðir)

1. Teletænastan (óvirkin) www.teleserve.fo
2. Canboats (óvirkin) www.canboats.com
3. Teletech (MET) www.teletech.fo
4. iConcept www.iconcept.fo

Koncessión á 5. stigi
(3. stig, 4. stig + møguliga 1. stig, umframt fartelefonikervi og tænastur)

1. P/F Telefonverkið (FT Samskifti og FT Net) www.tele.fo www.ftnet.fo
2. Kall www.kall.fo

## 4. Fjarskiftisveitingar og marknaðarstøðan

Í fylgiskjali 1 eru hagtøl 2007 fyri fjarskiftisveitingar hjáløgd.

### 4.1. Breiðband og internet

Dekningurin av landinum við ADSL breiðbandi er nú soleiðis, at nærum øll hava møguleika at keypa breiðsbandstænastur, og í flestu førum kunnu tey velja millum fleiri veitarar. Í mars 2007 varð mett, at 99,6 % av Føroya fólki hevði møguleika at nýta breiðband. Hetta ger samstundis Føroyar til eitt av fremstu londum í heiminum innan breiðbandsdekning.

Útbreiðslan av breiðbandi í mun til fólkatalið tykist eisini at vera høg og er støðugt vaksandi. Við árslok 2007 var talið á breiðbandshaldum komið upp á 13.200 hald. Hetta er ein vøkstur upp á góð 31 % í mun til árslok 2006 og ein vøkstur upp á góð 125 % í mun til árslok 2005.

Samstundis sum útbreiðslan av breibandshaldum veksur, minka haldini av uppringdum interneti. Við árslok 2007 vóru einans 1208 hald av uppringdum interneti. Hetta er ein minking upp á 60 % í mun til árslok 2006 og ein minking upp á 80 % í mun til árslok 2005, tá samlaða talið av haldum av uppringdum interneti var 6070 hald.

Príslegan fyri breiðsbandshald er eisini fallin nógv síðan byrjan og er nú komin niður á eitt støði, har flest øll húsarhald helst eru før fyri at gjalda bíligasta haldið í øllum førum.

### 4.1.2. Verkætlan um evnið *”Quality of services, standards and interlayer mapping”*

Í heyst hava Jostein Petersen og Jógvan Thomsen frá Fjarskiftiseftirlitinum luttikið á skeiðnum *”Broadband networks”* á Danmarks Tekniske Universitet. Í sambandi við skeiðið hava teir gjørt verkætlan og skrivað frágreiðing um evnið: *”Quality of services, standards and interlayer mapping”*. Verkætlanin tekur støði í føroyskum viðurskiftum og er gjørd í samstarvi við FT-Net. Dan Olsen, leiðari, hevur verið kontaktpersónur hjá FT-Net hesum viðvíkjandi.

Niðanfyri er gjørdur stuttur samandráttur av frágreiðingini. Frágreiðingin í síni heild er skrivað á enskum og avrit kann fáast við at venda sær til Fjarskiftiseftirlitið.

Internetið er ein sonevnd pakkakoplað skipan, t.e., at samskifti umvegis internetið fer fram sum pakkar, ið verða sendir frá sendara til móttakara. Hesir pakkarnir fara ígjøgnum mong ymisk lið í samskiftisskipanini. Í hvørjum einstøkum liði verða pakkarnir viðgjørdir og síðani avgreiddir víðari. Fyri at henda ”avgreiðslan” skal kunna handfarast, eru pakkarnir skipaðir við einum ”label” (merkiseðli) og einum ”content” (innihaldi), eins og ein vanligur postpakki hevur ein merkiseðil við bústaði, og so er innihaldið inni í pakkanum.

Í label-feltinum á IP-pakkanum eru ymisk feltir. Har eru feltir, ið siga hvørjari IP-adressu pakkin er sendur frá, og hvaðar pakkin skal sendast. Harumframt eru tvey feltir, ið hava ógvuliga stóran týdning fyri, hvussu pakkin verður handfarin av teleskipanini. Tey eru:

1) Quality of service (tænastustøði) og

2) Class of service (tænastuslag)

*Quality of sevice /tænastu støði (QoS)*
Í IP-protokollini eru nøkur bit sett av til QoS. Um QoS bittini eru sett til 0, so fær pakkin seinastu avgreiðsluna, men um QoS bittini t.d. eru sett til 46, so verður pakkin avgreiddur víðari beinanvegin.

*Class of Service / tænastu slag (CoS).*
Verður eisini nevnt: Type of Service (ToS). CoS bittini siga, hvat slag av tænastu talan er um, t.d. um talan er um fílu-flutning, IP-telefoni, ella ”real-time”(samtíðar) video-tænastu. Eitt nú hevur tað ikki so stóran týdning, um ein fíluflutningur gongur seint, meðan tað hevur størsta týdning, at eingir bitfeilir henda í fíluflutinginum. Hinvegin so hevur tað avgerandi týdning, at ein ”real-time” – tænasta fær skjóta pakkaavgreiðslu á samskiftisnetinum. T.d. hevur tað minni týdning fyri VoIP (telesamrøðu umvegis internetið) um bitfeilir henda í samskiftinum, meðan tað hevur størsta týdning, at IP-pakkarnir verða skjótt avgreiddir.

FT-Net hevur upplýst fyri Fjarskiftiseftirlitinum, at QoS bittini hjá privatkundum hava verið sett til 0 (ringasta tænastustig), men um vinnuvirkir hava goldið fyri tað, so hevur verið veitt eitt hægri QoS-støði.

Fjarskiftiseftirlitið hevur mælt FT-Net til neyvt at umhugsa, hvussu QoS og CoS bittini verða handfarin í samskiftisskipanini.

FT-Net hevur síðani boðað Fjarskiftiseftirlitinum frá, at tað framyvir verður møguleiki fyri 3 tænastustigum (QoS-level).

Fjarskiftiseftirlitið metir, at arbeiðast má víðari við málinum, so at samskiftisorkan hjá føroysku internetskipanini verður gagnnýtt so skynsamt sum til ber, so føroyski samskiftisbrúkarin fær so høgt tænastustøði sum til ber í mun til prís og samskiftisorkuna á føroyska samskiftiskervinum.

### 4.2. Fastnet- og IP-telefoni

Innan fastnetstænastur minkar ferðslan framvegis nógv. Av tí at nógv fólk hava skift til breiðband, stendur fólki í boði at samskifta umvegis IP-telefoni. Tað veri seg frá føroysku veitarunum iConcept og Teletech, sum komu á marknaðin í desember 2005, ella útlendskum veitarum sum t.d. Skype. At ringja við IP-telefoni til útlandið er munandi bílígari enn vanligt fastnet, t.d. er tað bíligari at ringja til Danmarkar enn at ringja við vanligum fastneti til grannan. Hóast ferðslan av IP-telefoni frá føroyskum veitarum enn ikki rættiliga hevur tikið dik á seg og enn er sera lítil í mun til aðrar telefoni tænastur, so sæst tó ein greiður vøkstur í ferðsluni í seinni hálvu av 2007. Væntast kann, at IP-telefoni útbreiðslan frá føroyskum veitarum fer at økjast, m.a. tí at sera nógv fólk hava útvegað sær breiðband, umframt at aðrir veitarar væntandi fara at bjóða IP-telefoni tænastur.

Umframt føroysku veitararnar innan IP-telefoni eru eisini fleiri útlendskir veitarar á føroyska marknaðinum. Hagtøl, ið lýsa talið av útlendskum IP-telefoni haldum, sum t.d. Skype, eru ikki tøk í Føroyum; tískil er ávís óvissa um veruligu útbreiðsluna av IP-telefoni í Føroyum. Viðmerkjast kann, at Skype ikki hevur gateway til føroyska fastnetið, og tískil eru innanlands samrøður umvegis Skype lutfalsliga dýrar. Ongar reglur eru, sum forða útlendskum veitarum at seta gateway upp í Føroyum, so orsøkin er helst, at teir meta føroyska marknaðin vera ov lítlan.

Sum heild er góðskan á IP-telefoni samskifti ikki á sama støði sum samskifti umvegis vanligt fastnet, men alsamt vaksandi bandbreiddin bæði innan- og uttanlands bøtir støðugt um hetta. Hinvegin er IP-telefoni samskifti væl kappingarført, tá tað ræður um prísir fyri uttanlands samrøður.

Tøkniliga trygdin á IP-telefoni er eisini framvegis munandi verri enn á fasta netinum, og er hetta helst ein av orsøkunum til, at fastnetið framvegis hevur meginpartin av innanlands ferðsluni.

Ein onnur orsøk til at ferðslan innan fastnet minkar er, at prísirnir innan fartelefoni eru minkaðir nakað.

## 4.3. Fartelefoni

Á fartelefoni økinum eru tveir veitarar á marknaðinum, Føroya Tele og Kall, ið báðir veita GSM-900 tænastur. Føroya Tele hevur landsdekkandi kervi, og Kall hevur egið kervi, ið røkkur stóran part av landinum. Kall hevur eina innanlands reikingaravtalu við Føroya Tele fyri tey øki í landinum, har Kall ikki røkkur.

Eisini í 2007 var týðiligur vøkstur innan fartelefoni. Við árslok 2007 var samlaða talið av fartelefoni haldum 52.169.

GPRS dátuflutningur hevur nú verið tøkur fyri fartelefonbrúkarar í eini trý ár. GPRS merkir "General Packet Radio Service" og er ein háttur at senda og móttaka dátuflutning umvegis fartelefonina. Við GPRS ber til at røkka internetinum umvegis fartelefonina.

Fyrstu árini var nýtslan innan GPRS ikki stór, men í 2007 hevur verið ein týðiligur vøkstur í nýtsluni. Serliga hevur Føroya Tele havt stóran vøkstur.

Innan nýtslu av MMS-boðum er stór minking. Frá 1. hálvári til 2. hálvár 2007 minkaði talið av sendum MMS-boðum niður í eina helvt. Høvuðsørsøkin til at MMS-boð ikki sláa ígjøgnum hjá brúkaranum er helst, at tað ikki ber til at senda MMS-boð ímillum fartelefon hald hjá ávíkavist Føroya Tele og Kall. Arbeitt hevur verið við at gera eina sambindingaravtalu partanna millum hesum viðvíkjandi, men enn er eingin avtala komin í lag. Í løtuni liggur arbeiðið at gera sambindingarsáttmála stilt.

## 4.4. Fylgisveinatænastur

Teletænastan (TeleServe) er meginveitari, umframt FT Samskifti og Vikmar. Fleiri nýggjar tænastur verða støðugt mentar til stórt gagn fyri brúkararnar, serliga á havinum.

## 4.5. Sjóøkið

Í næstum byrjar Tórshavn Radio AIS (Automatic Identitets System) tænastu. Henda tænasta er knýtt at "MMSI-nummarinum" hjá teimum einstøku skipunum. Í løtuni hava Føroyar fingið tillutað 999 MMSI-nummur og av teimum verða 600 nýtt. Av tí at væntast kann, at verandi og líknandi tænastur fara at økjast í framtíðini, hevur Fjarskiftiseftirlitið søkt altjóða mynduleikar um fleiri nummur.

## 4.6. Kringvarpsvirksemi v.m.

Áhugin fyri kringvarpi í Føroyum hevur verið lutfalsliga stórur síðani einkarrætturin varð avtikin í 1999.

*Útvarp*
Innan útvarp eru 3 at kalla landsdekkandi ræsur - Útvarp Føroya, Lindin og Rás2. Í 2007 varð Rás2 seld til Miðlavarpið. Netparturin var tó ikki seldur við, men varð lagdur í annað felag, Steinamørk. Allar ræsurnar senda við analogari tøkni, og í stóran mun ber til at móttaka í stereogóðsku. Hartil sendir ÚF á millumbylgju, ið røkkur kring Føroyar og í norðurhøvum.

*Sjónvarp og fylgisveinasjónvarp*
Umframt SVF, ið røkkur kring alt landið, eru fleiri sjónvarpskaðalnet knýtt at limum í eigarafeløgum. Koncessiónirnar til eigarafeløgini eru avmarkaðar til kaðalnet til sjónvarp og intra- og internet í avmarkaðum landafrøðiligum øki, t.e. einum býlingi o.l.

Televarpið hevur við sínum digitalu jørðsendinets-tænastum (DVB-T ella DTT tænastur) havt eina støðuga útbygging. Í 2006 komu fleiri sendidestinatiónir, ið hava bøtt munandi um sjónvarpsgóðskuna á teimum minnu plássunum í "norðøkinum", og í 2007 er úbyggingin farin víðari til "suðurøkið", og Televarpið bjóðar nú tænastur sínar út í Sandoy og fleiri av bygdunum/býunum í Suðuroy.

## 4.7. ÚF/SVF sendinetini (Kringvarp Føroya)

Sendinetini hjá ÚF/SVF hava í fleiri ár verið rikin av Føroya Tele, ið fær eina árliga upphædd til rakstur og viðlíkahald fyri uppgávuna.

FSE hevur í frágreiðing, ið ein arbeiðsbólkur í 2005 læt landsstýrismanninum, gjørt vart við týdningin av at bjóða rakstur av sendinetum út, umframt at víst var á ymisk kappingaratlit í sambandi við komandi sendinet.

Málsøkið varð 1. januar 2006 flutt til Mentamálaráðið og sum skilst, er ætlanin at fara undir at bjóða tænastur út.

Á heysti 2005 samtykti Løgtingið at skifta MB-sendaran í Akrabyrgi út. Sjálv útskiftingin er enn ikki farin fram, men sum skilst verður hetta í næstum.

Sendarar eru uppsettir, ið bøta munandi um móttøkugóðskuna í Sundalags-, Hvannasunds- og Tvøroyrarumráðnum. Mentamálaráðið hevur søkt um loyvi til FM-sendara á Sornfelli. Fjarskiftiseftirlitið viðger í løtuni hesa umsókn og hevur runnið seg í onkur ósamsvarandi áhugamál, m.a. meta loftferðslumyndugleikarnir, at FM-sendarar á Sornfelli kunnu ávirka ILS-skipanina (Instument Landing System) á flogvøllinum í Vágum, tí innflúgvingarleiðin hjá flogførunum yvir Miðvág liggur tætt við Sornfelli, og innflúgvingarleiðin inn gjøgnum Sørvág er í linju móti Sornfelli. Fjarskiftiseftirlitið arbeiðir víðari við at finna eina loysn á hesum trupulleika.

### 4.8. Uttanlandssamskiftistøknir

Møguleikarnir fyri uttanlandssamskifti eru hesir:

1. Fylgisveinar
2. Sjókaðalin CANTAT-3
3. Sjókaðalin FARICE-1
(4. Sjókaðalin SHEFA-2 frá apríl 2008)

FARICE-1 kaðalin varð tikin í nýtslu í 2004. FARICE-kaðalin liggur millum Skotland, Føroyar og Ísland. Umframt FARICE-kaðalin hava Føroyar eisini samband við umheimin umvegis Cantat-3 kaðalin. Cantat-3 kaðalin hevur avmarkaðan kapasitet í mun til FARICE-1 kaðalin. Cantat-3 kaðalin, ið varð tikin í nýtslu í 1994, er gamal, og tað letur til, at hann hevur tænt fyri seg.

Føroya Tele boðaði í 2006 frá, at felagið hevði tikið avgerð um at gera íløgu í ein nýggjan sjókaðal. Kaðalin kallast SHEFA-2 og liggur millum Føroyar, Hetland, Orknoyggjar og Skotland. Føroya Tele stovnaði í mai 2007 nýtt dótturfelag, nevnt P/F SHEFA. Hetta nýggja felagið fekk á sumri 2007 koncessión til at leggja og reka sjókaðalin.

Í september 2007 varð fyrsti parturin at leggja kaðalin liðugur. Tá kom sjókaðalin í land á Hvítanesi, og av Hvítanesi varð hann førdur niðan í Klingruna, høvuðssætið hjá Føroya Tele. Hesin fyrsti partur knýtir Føroyar og Hetland saman.

Síðani hevur verið arbeitt við at leggja kaðalin millum Hetland, Orknoyggjar og Skotland. Hetta arbeiðið varð liðugt í oktober 2007.

Í løtuni verður síðsta hond løgd á innleggingararbeiðið á kaðalstøðunum í Føroyum, Hetlandi, Orknoyggjum og Skotlandi og á at rigga til sambandið úr Skotlandi til London.

Kaðalin verður væntandi klárur at taka í nýtslu í apríl 2008.

Eftir hetta skuldu Føroyar havt trygt og munagott samskifti við útheimin í nógv ár framyvir.

## 5. Treytir og meginreglur

### 5.1. Sambinding og samskipan av fjarskiftiskervum og fjarskiftistænastum

Sambært fjarskiftislógini eru koncessiónshavarar álagdir at geva seg undir ótálmaða sambinding og samskipan av almennum fjarskiftiskervi og almennari fjarskiftis-tænastu. Um annar koncessiónhavari vil binda fjarskiftiskervið hjá sær upp í fjarskiftiskervið hjá viðkomandi, skulu partarnir gera sáttmála um samanbindingina og treytirnar fyri henni.

Føroyska fjarskiftislógin er ein sonevnd rammulóg, t.e., at hon ikki neyvt ásetir hvørjar tøkniligar sambindingar og samskipanir kunnu fara fram, men heldur lýsir nøkur fyribrigdi, ið síðani skulu metast um, út frá um tað t.d. tøkniliga, umsitingarliga og fíggjarliga letur seg gera.

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir sambindingar- og samskipanarsáttmálar av fjarskiftis-kervum, ið eru tøkir á føroyska marknaðinum til koncessiónshavarar:

*Føroya Tele Samtakið (FT Net og FT Samskifti) veitir fylgjandi sambindingar- og samskipanartænastur:*

1. Sambinding av internetryggum / atgeingi til altjóða internetið.
2. Kopklaður samflutningur á fastnetinum PSTN/ISDN.
3. Fast forskoyti og forskoyti til PSTN/ISDN.
4. Innanlands leigulinjur.
5. Uttanlands leigulinjur á FARICE-1 og CANTAT-3, við backhaul.
6. Innanlands reiking innan fartelefoni GSM-900.
7. Samhýsing – mastrar/hús kring um í Føroyum.
8. Tænastuavtalu (hald o.a.) á fastnetinum PSTN.
9. Svart fipur atgeingi.
10. Rátt kopar – shared Access.
11. CNA-tænasta (Changed number announcement).
12. Bitstream Access xDSL v/IP-konnektiviteti.
13. MPEG transmissión til einvegis dátuflutning (í sambandi við kringvarp).

*Kall veitir fylgjandi sambindingar- og samskipanartænastur:*

1. Sambinding av internetryggum / atgeingi til altjóða internetið.
2. Innanlands leigulinjur.
3. Uttanlands leigulinjur á FARICE-1 og CANTAT-3, við backhaul.
4. Samhýsing – mastrar/hús kring um í Føroyum.
5. CNA-tænasta

*Teletech veitir fylgjandi sambindingar- og samskipanartænastur:*

1. Samhýsing – mastrar/hús kring um í Føroyum.

*THOR-IX*

KT-felagið hevur meira ella minni óformliga rikið sonevnda THOR-IX í Tórshavn, ið er ætlaður at tryggja, at innanlands internetferðsla verður umskift í landinum og ikki tyngir uttanlands kapasitetin. Í eina tíð hevur verið arbeitt við at leggja innanlands internetferðsluna um til ein virtuellan IX, ið FT Net skal húsa. Í september 2007 byrjaði FT Net við eini IX-loysn, soleiðis at allir internetveitarar í Føroyum, uttan ein, nú eru knýttir at IX-inum hjá FT Net.

## 5.2. Prísásetingarmeginreglur

Ein týðandi partur av fjarskiftisskipanini er prísásetan og marknaðarframferð.

Í fylgiskjali 1 til koncessiónir eru ásettar meginreglur viðvíkjandi prísáseting. Harumframt eru í fylgiskjali 1 til koncessiónina hjá Føroya Tele ásett hámarksgjøld fyri ymiskar fjarskiftistænastur.

Sambært prísásetingarmeginreglunum í fylgiskjali 1 til koncessión til veitararnar skal Fjarskiftiseftirlitið m.a. góðkenna avsláttarskipanir. Fjarskiftiseftirlitið hevur gjøgnum árini haft fleiri mál til viðgerðar viðvíkjandi prísáseting, avsláttri og øðrum fevnt af prísásetingarmeginreglunum í fylgiskjali 1.

Koncessiónin hjá Føroya Tele, ið var tann fyrsta av sínum slag, er sambært galdandi lóggávu bert galdandi til 1. januar 2009. Aðrar koncessiónir fara úr gildi seinni í 2009. Skipanin við koncessiónum og innihaldið í teimum skal tískil takast upp til nýggja viðgerð í hesum árinum. Í hesum sambandi verður eisini neyðugt at viðgera innihaldið í prísásetingarmeginreglunum í fylgiskjali 1, har tørvurin á tillagingum uttan iva er stórur. Fjarskiftismarknaðurin í dag er ein heilt annar enn í 1999, tá koncessiónir á fyrsta sinni vórðu veittar. Fjarskiftisveitararnir veita í dag í stóran mun ikki einans standard fjarskiftisveitingar, men veita eisini fleiri ymiskar tænastur, ið eru uttan fyri eftirlitsøkið hjá Fjarskiftiseftirlitinum, t.d. ymiskar KT-loysnir o.a.

### 5.2.1. Prískanning

Fjarskiftiseftirlitið hevur í hyggju at kannað prísviðurskifti á føroyska fartelefonmarknaðinum. Í løtuni verður arbeitt við eini kanning av fartelefonprísum hjá endabrúkarum. Í høvuðsheitum er talan um at gera eina samanberandi greining av føroyskum fartelefonprísum hjá endabrúkarum í mun til fartelefonprísir í okkara grannalondum.

## 5.3. Veitingarskyldan hjá Føroya Tele

Sambært fylgiskjali 3 í koncessión til Føroya Tele frá 15. apríl 1999 hevur Føroya Tele veitingarskyldu á vanligari fastnetstelefoni (PSTN og ISDN) sambært neyvari treytum, ásettar í fylgiskjalinum. Tað er vanligt, at størsti veitarin á einum marknaði verður álagdur eina veitingarskyldu.

Eins og meginøkið hevur útjaðarin í Føroyum sum heild eitt nøktandi útboð av fjarskiftistænastunum, fastneti, uppringdum interneti, fartelefoni og breiðbandi. Tað eru heilt fá búpláss eftir, ið ikki hava møguleika at samskifta umvegis breiðbandið.At byrja at veita nýggjar tænastur, t.d. breiðband, er fyri veitaran ein spurningur um stovningarkostnað í mun til íbúgvaratal og inntøkumetingar.

Føroya Tele er eisini álagt veitingarskyldu til grundleggjandi tænastur fyri deyv. Veitingarskyldan viðvíkjandi tænastum til deyv varð áløgd í 1999, men hesar tænastur eru tøkniliga ikki tíðarhóskandi longur.

Í sambandi við ætlan at leggja fipur til heimið, varð í 2006 hol sett á arbeiðið at endurskoða innihaldið í veitingarskylduni og at gera eina nýggja allýsing av hesi skyldu. Arbeiðið við at leggja fipur til heimið hevur drigið nakað út, og sostatt er nýggj veitingarskylda ikki allýst enn. Allýsing av nýggjari veitingarskyldu verður tikin við í arbeiðinum at endurskoða innihaldið í koncessiónum. Ì hesum sambandi er neyðugt, at m.a. fylgjandi spurningar verða viðgjørdir:

1. Hvørjar fjarskiftistænastur skulu verða fevndar at veitingarskylduni?
2. Kann veitingarskyldan nøktast tøknineutralt?
3. Útboð av veitingarskyldutænastunum til fólk við breki, kanska serliga við hoyribreki.
4. Ásetan av minstu góðskukrøvum o.a.

## 5.4. Tilbúgvingarviðurskifti

Í fylgiskjali til koncessiónina er Føroya Tele álagt at røkja serligar uppgávur í sambandi við almennu tilbúgvingarskipanina. Uppgávurnar hava til endamáls at tryggja samfelagstýðandi fjarskifti, sum fevnir um fjarskiftiskervið og fjarskiftistænastur, ið verða veittar alment, og sum eru neyðugar fyri at kunna røkja uppgávur, ið hava sum endamál at fyribyrgja, avmarka og veita hjálp í sambandi við skaða á persónar, ognir og umhvørvi, tá vanlukkur, katastrofur og tílíkt henda, ella tá vandi er fyri hesum.

Kall hevur í fylgiskjali eisini fingið álagt nakrar uppgávur í hesum sambandi, men høvuðsbyrðan liggur á Føroya Tele, av tí at felagið er meginveitari í Føroyum og hevur grundleggjandi undirstøðukervi um hendi.

Í koncessiónum veittar øðrum veitarum er sett inn áseting, at fjarskiftisveitararnir eftir áheitan frá landsstýrismanninum skulu taka lut í almennu tilbúgvingarskipanini.

Føroya Tele er álagt ókeypis at tryggja ráðlegging og fremjan av tilbúgving innan fjarskifti viðvíkjandi alarmsentralinum, harundir at røkja og viðlíkahalda 112-vekslaran við tilhoyrandi tól- og ritbúnaði.

Føroya Tele er eisini álagt ókeypis at stovna og røkja serliga leigulinjuskipan. Upprunaliga varð ásett, at leigulinjuskipanin skuldi setast í verk innan 1. september 2005. Av ymiskum orsøkum dró arbeiðið við at seta upp leigulinjur út, og í november 2006 steðgaði arbeiðið upp, orsakað av at onkur misskiljing frá byrjan av hevur verið partanna millum, her serliga millum Politiið og Føroya Tele. Politiið førdi fram, at leigulinjurnar í síni heild ikki kunnu bindast í 112-vekslaran, sum fylgiskjali ásetur, men at nakrar linjur mugu bindast í vanliga vekslaran hjá Politinum, 351448. Steðgur er framvegis í arbeiðinum at stovna nevndu leigulinjuskipan.

Í samband við stovnan av leigulinjuskipan var eisini fyrireikað at áseta skyldur í fylgiskjal til koncessión hjá Rás2 (nú Steinamørk) og Lindini um fjølmiðlatilbúgving,

umframt at fáa í lag avtalu við Kringvarp Føroya (ÚF og SVF) um fjølmiðla-tilbúgving. Ásetingar um skyldur til fjølmiðlatilbúgving var komið væl áleiðis, men orsakað av, at arbeiðið við at stovna leigulinjuskipan liggur stilt, er arbeiðið viðvíkjandi fjølmiðlatilbúgving heldur ikki komið víðari.

Onnur tilbúgvingarkrøv, ið eiga at verða tikin upp og viðgjørd, eru t.d. neyðstreymur, vernd av útgerð, bygningum og starvsfólkatilbúgving.

## 6. Nummarviðurskifti

Fjarskiftiseftirlitið umsitur einkarrætt landsins til nummartilfeingi. Føroyska nummar-skipanin, sum er eitt yvirlit yvir nummur til sertænastur, fastnet, fartelefoni og ymiskar serkotur, er teldutøk og er at finna á heimasíðuni hjá Fjarskiftiseftirlitinum, www.fse.fo.

Í Føroyum hava vit ikki sonevndan nummarportabilitet, ið kundi verið aktuellur fyri kundar, ið skifta millum veitararnar á fartelefonøkinum og frá fastnet til IP-telefoni. Nummarportabilitetur er ein tænasta, ið merkir, at ein endabrúkari hevur møguleika at flyta sítt telefonnummar frá einum veitara til ein annan. Fjarskiftiseftirlitið hevur undanfarnu ár kannað henda spurningin nakað og samskift við veitararnar hesum viðvíkjandi.

Framvegis er lítil áhugi hjá veitarunum fyri hesi skipan, serliga tí at mett verður, at stovningarkostnaðurin er ov høgur í mun til brúkaraskaran og í mun til gagnvirki.

Ein fyribils loysn, ið verður brúkt, er ein sonevnd CNA-tænasta (Changed number announcement), har ein boðklivi boðar frá nýggja nummarinum hjá felaganum. Fjarskiftisveitarar hava gjørt samstarvsavtalur um hetta.

## 7. Einskiljingartilgongdin av Føroya Tele

Fyrrverandi einkarfelagið, P/F Telefonverkið (Føroya Tele), ið er farið um tey 100 árini, er framvegis almenn ogn. Í fleiri ár hava ymisk politisk ynski verið frammi um at einskilja felagið. Í februar 2008 varð nýggj samgonga skipað, men enn eru ongar greiðar fráboðanir ella ætlanir alment stungnar út í kortið, um hvat nýggja samgongan ætlar viðvíkjandi einskiljing av almennum fyritøkum, harundir Føroya Tele. Viðvíkjandi einskiljing er í samgonguskjalinum ásett: "*Einskiljingar verða framdar, um mett verður, at tær eru til gagns fyri samfelagið og vinnubygnaðin*".

Í sambandi við einskiljing av Føroya Tele hevur Fjarskiftiseftirlitið í 2006 víst á tvær loysnir. Eina loysn *A. Fremja eina einskiljing av FT Samtøkuni* og eina loysn *B. Fremja eina fulla ognarskiljing av FT Net úr Føroya Tele Samtøkuni.* [1]

---

[1] Upprit frá FSE, dagfest 17. mars 2006: *"Eftirmeting av bygnaðinum hjá P/F Telefonverkinum (Føroya Tele Samtakinum) ið varð settur í verk í juli 2005"*.

Torført er endaliga at taka dagar í millum loysn A og B. Ein av grundfatanunum, ið liggur handan loysn B, er, at netfelagið hevur eitt infrakervi um hendi, t.e. kopar- og fipurkervi, og tað er sera kostnaðarmikið at røkja. Tó so, ymisk tráðleys kervi eru eisini, t.d. FWA, og tað vinna alsamt fleiri ymiskar nýggjar tøknir fram.

Av týdningi er m.a., hvussu framtíðar marknaðarstøðan á fjarskiftisøkinum háttar sær, tá hugsað verður um íløgutørv og tøknifrøði. Møguleiki er fyri, at kostnaðarstøðið av at seta í verk nýggjar tøknir, eins og kostnaðurin fyri at stovnseta seg á føroyska fjarskiftismarknaðinum, sum frá líður verður minni ella heldur sær á sama støði sum nú. Um so verður, eigur loysn B at verða tikin framum, tí hendan skapar betri fortreytir fyri fleiri aktørum á marknaðinum, og tískil betri fortreytir fyri virknari kapping á kervisøkinum.

Við framtíðini í huga metir FSE, at samanumtikið má roknast við, at tær einstøku skipanirnar verða minni, hvat íløgu, íverksetan og rakstri viðvíkur.

Um loysn A verður vald, metir FSE, at tað er umráðandi, at ymiskar eftirlitsheimildir verða lagdar til myndugleikan. Eitt nú kundi verið talan um at áseta reglur um samleggingareftirlit, soleiðis at myndugleikin kann seta bæði bygnaðarligar og atferðartreytir til eina møguliga samanlegging av FT Net og FT Samskifti, um FT Samtøkan verður seld undir einum. FSE metir sum útgangsstøði, at frægast er, at samanleggingareftirlit av fjarskiftisfyritøkum verður fevnt av tí generella samanleggingareftirlitinum við heimild í kappingarlógini, heldur enn at áseta serligar reglur hesum viðvíkjandi í fjarskiftislógini. Hetta fyrst og fremst tí at samanleggingareftirlit er eitt viðkomandi amboð í nógvum vinnugreinum, havandi í huga mongu tyrpingarnar innan ymisku vinnugreinarnar.

FSE metir tað eisini vera hóskandi, at heimildir verða lagdar til myndugleikan, soleiðis at myndugleikin kann krevja neyvari greinað virksemi í dótturfeløg.

Havast má í huga, at er loysn A fyrst vald, ber sera illa til at velja loysn B seinni, men um loysn B verður vald, ber til at fara aftur til eina støðu sum loysn A.

Samanumtikið ræður um at finna eina loysn, ið ikki læsir støðuna fasta framyvir, men loyvir tillaginum, soleiðis at føroyski fjarskiftismarknaðurin til eina og hvørja tíð hevur kappingarførar og dagførdar kervistænastur, ið allir veitarar hava javnbjóðis atgongd til og harvið hava møguleika fyri at veita endabrúkaranum eitt breitt og fjølbroytt útboð av fjarskiftistænastum til kappingarførar prísir.

**8. Radioeftirlitsvirksemi – tilluting av frekvensum (tíddum), radioprógvum o.a.**
Radioeftirlitsdeildin hevur um hendi umsiting av frekvens(tíddar)- og radioloyvum til:

Bátar / Skip / Flogfør
Radiostøðir á landi
Áhugavarparar

Radioeftirlitsdeildin hevur eftirlit við hesum radiostøðum eins og avlurting (monitering) av tíddum, peiling av radioórógv o.ø.

Deildin umsitur, próvdømir og útskrivar siglinga radiopróvbrøv til navigatørar.

Gongdin vísir alsamt størri og vaksandi eftirspurning eftir frekvensum í sambandi við frælsgering av fjarskiftinum í Føroyum umframt ein vaksandi eftirspurning eftir siglinga radioprógvbrøvum.
Siglinga radioprógvbrøvini fevna um:

| | |
|---|---|
| GOC | General Operator's Certificate |
| LRC | Long Range Certificate |
| ROC | Restricted Operator's Certificate |
| SRC | Short Range Certificate |

Loyvishavararnir gjalda árligt loyvisgjald, umframt at nøkur próvbrøv skulu endurnýggjast við jøvnum millumbili.

*Loyvir á radioøkinum*

| | Samlað tal pr. 31.12.2007 | Tilgongd/ frágongd í mun til 31.12.2006 |
|---|---|---|
| Bátar og skip | 2184 | + 32 |
| Landstøðir | 1.226 | - 26 |
| MMSI | 516 | - 3 |
| Áhugavarparar | 56 | - 1 |
| Radiopróvbrøv | 6.482 | + 323 |

Umframt tilgongd og frágongd av loyvum á radioøkinum er eisini talan um vaksandi kundarøkt á øllum økjum.

Fyri Bátar og Skip hevur verið lítil tilgongd í 2007. Sigast kann tó, at stígur er komin í tilgongdina, og at talið framyvir fer at liggja millum 2.100 og 2.200, sum tó má sigast at vera sera høgt í mun til fólkatalið, tá vit samanbera okkum við grannalondini.

Fyri Landstøðir heldur afturgongdin fram. Sum áður nevnt, kemst hetta mest av at nakrir brúkarar av landmobilum radioútbúnaði eru farnir frá at brúka siðvandan, landmobilan radioútbúnað til at brúka eitt nú fartelefonir í staðin.

Tað hevur verið stórur áhugi á FWA umráðnum. Hetta hevurført við sær, at 3,6 – 3,7 GHz varð opnað til WiMax tænastur. Tænasturnar eru higartil serliga útbjóðaðar í Høvuðsstaðarøkinum og á Skálafjarðarøkinum.

Nýggj frekvensætlan fyri Føroyar varð sett í gildi í juni 2007. Umframt, at frekvensætlanin sum heild er dagførd, eru eisini nýtsluvegleiðingar gjørdar. Tann føroyska frekvensætlanin er á jøvnum føti við frekvensætlanirnar í grannalondunum og í nøkrum førum betri.

**9. Altjóða og millumtjóða viðurskifti**

Í altjóða fjarskiftishøpi eru Føroyar í ITU (International Telecommunication Union) skrásettar sum „territorial administration“ (økisumsiting), og samskifta Føroyar beinleiðis við ITU í ymiskum viðurskiftum.

Fjarskiftiseftirlitið hevur eisini møguleika fyri at luttaka saman við danska IT- og Telestyrelsen og Videnskabsministeriet á fundum o.ø. innan ITU umframt í øðrum fjarskiftisfelagsskapum.

Annars hevur Fjarskiftiseftirlitið gott samband við fyrisitingarmyndugleikar innan fjarskifti, serliga í Norðurlondum.

Síðani á vári 2006 hevur Fjarskiftiseftirlitið verið føroyskt umboð í GAC (Governmental Advisory Committee) innan ICANN. ICANN er felagsskapurin, ið umsitur eyðmerkingarskipan og protokollir á internetinum. FSE hevur ætlanir um at gera nøkur tilmæli og uppskot um leiklutin hjá Føroyum í ICANN og samskipan á økinum við FO-ráðið, ið umsitur .fo navnaøkið.